## Daniel var ein álitismaður, men kláraði ikki altíð at stýra sinninum

Daniel var ein dygdarmaður. Tað var ikki bert at siga tað at sigla á eini slíkari á. Her var stórur vandi fyri seg sigla seg á sandriv, eins og tað kundi vera so nógvur mjørki, at einki sást. Men hetta segðist Daniel at klára heilt væl, sum tað eisini verður tikið til í dagbókini 28. august, har Casement skrivar: "Dýpið er 1½ favnur. Hava fleiri ferðir borið við sandriv. Máttu steðga tvær ferðir vegna mjørka. Men Danielsen fekk alt hetta at ganga kortini."

Men vansin við Daniel var tó, at hann var so ógvuliga illsintur, og hetta var eisini fleiri ferðir nevnt í dagbókini. Hann var ein harður skipari. Hetta var ikki minst galdandi í samband við nevndu viðahøgging.

Ein frásøgn er frá 25. juli, tá ein drongur Nimpowka hevði fingið undir vangan, og longu 28. juli er aftur galið, tá ið tað er stríð millum Danielson, sum hann verður nevndur, og nakrar av manningini.

Ein hending er farin fram 15. august, har úrslitið var, at ein træhøggari hevði mist sína øks og jungluknívar orsakað av einum illsinnisriði hjá Daniel.

Annars verður greitt frá í eini notu, at kæra hevði verið send høvuðsstøðini hjá Balolo missiónini í 1902 um Daniel og tveir aðrar trúboðarar Ellery og Armstrong, at teir høvdu verið harðligir móti innføddum, men hesar kærur vóru seinni tiknar aftur.

Men hetta sigur tó nakað um, at viðurskiftini við samstarvsfólkini ikki vóru av teimum bestu.




Trúðarafelagar hjá Daniel í Congo Balolo Mission William Armstrong og konan

Tað var eisini soleiðis, at vanliga fatanin hjá teimum hvítu, kanska eisini hjá trúboðarum var, at teir innføddu ikki fingust at arbeiða uttan so, at teir høvdu eina harða hond yvir seg.

Tann 15. september verður Daniel settur í land sjúkur, tá ið nærum er komið til endan av ferðini, sum er 20. september. Hann má hava verið rættiliga sjúkur, tá ið hann ikki kann taka allan teinin. Tað er neyðugt at fáa ein nýggjan skipara, og hesin kallast Captain Shaw.

Tann 15. oktober ger Casement upp virðið á teimum tænastum, sum hann hevur fingið frá missiónini. Upprunaliga ætlanin hevði verið at leigugjaldið fyri skipið skuldu vera £ 45 um mánaðin, men tá saman um kom vildi missiónin ikki hava pening. Kortini mælir Casement til at geva £ 25 fyri lán av skipinum og £ 20 fyri luttøkuna hjá Daniel. Tá hugt verður eftir lutfall millum skip og mann, kann vist sigast, at Daniel hevur verið høgt virðismettur.



Roger Casement er ein annar høvuðspersónur. Hann varð seinni aðlaður av bretska konginum og í 1916 varð hann hongdur av bretum! Hesa søguna hava vit í komandi blaði

## Daniel til Bretlands og hittir uttanríkisráðharran

Tann 20. september fer Daniel heim til Bretlands við skipinum Phillippeville, ein ferð sum tók um trýggjar vikur. Tískil er hann komin fram til Bretlands um 10. oktober.

Tað vóru annars trý skip, sum sigldu regluliga rutu millum Belgia og Congo.

Við í hesum farti er eisini brøvini, Casement hevur skrivað til bretska uttanríkisráðið. Sagt verður í føroyskum keldum, at Daniel hevur hitt uttanríkisráðharran Lansdowne og hevur greitt honum frá støðuni í Congo. Tað finst eingin váttan fyri hesum, men í so fall er hetta helst hent beinanvegin, hann er komin til Bretlands, áðrenn Casement kom fyrst í desember. Hann kann eisini hava havt boð við sær frá Casement.

Nú er so Daniel komin til Bretlands í farloyvi, og grundgevingin er, at hann er sjúkur.



Leopold II kongur er ein høvuðspersónur í hesi søgu, men fyri tað ringa

Tá ið hann kemur heim greiðir hann missiónini frá tí, hann hevur upplivað. Men har verður avgjørt einki at gera við hetta fyrr enn Casement kemur heim við síni rapport. Hann kom annars heim fyrst í desember og hansara frágreiðing kom fram fyrst í 1904.

## Óynsktur í Congo

Trúboðarafelagin Armstrong tykist at hava lagt ringt orð fyri Daniel við at siga, at hansara ógvusligu útsagnir ofta ikki eru eftirfarandi, og hann mælir frá at senda hann aftur til Congo. Hetta kann væl hava samband við teirri tvístøðu, sum hevur verið millum trúboðarar, hvørt teir skuldi siga sum minst um ágangin móti fólkinum.

Um pástandin, at Daniel ikki hevur verið eftirfarandi kann sigast, at í tí, sum er greitt frá í Føroyum um hann, og sum má vera komið frá honum sjálvum, er einki sum stríðir ímóti tí, sum kann skjalprógvast.

Tað eru mótstríðandi frágreiðingar og tilmæli, sum missónsfelagskapurin hevur at taka støðu til um, hvat skal henda Daniel, so avgerðin verður útsett.

Seinni koma hóttanir frá Walbaum, týskur maskinmeistari hjá Balolo Missónini og einum trúboðara, sum kallast Steel, at teir stinga í sekkin, um Daniel kemur aftur. Tí er best at biðja hann um at siga upp, verður sagt.

Málið dregur út og eingin avgerð verður tikin. Í mai 1904 er Daniel giftur, og hann er ótolin eftir at fáa svar.

Tað er ósemja bæði í missiónini í Englandi, og millum maskinmeistararnar í Congo um, hvat skal henda. Men tá koma tey boð frá myndugleikunum, sum avgera spurningin. Daniel er "persona non grata" í Congo, tað vil siga óynsktur av myndugleikunum har, og hetta merkir, at kann ikki kann fara aftur til Congo.

At hann er óynsktur í Congo er lætt at skilja. Hann veit snøgt sagt ov nógv um skilið har. Aðrir trúboðarar hava verið í sama stað, og hava bert havt vitan frá sínum egna øki, og tá hevur verið lættari at avnokta teirra útsagnir. Daniel hevur verið víða um og hevur sæð, at hesir ræðuleikar mugu so ella so vera fyriskipaðir og góðkendir av hægri myndugleikum. Opinskáraður hevur hann eisini verið. Tí hevur tað verið frægast at halda honum burtur. Betri eftirmæli kann hann ikki hava fingið.

Ummælið av honum er annars, at hann er samvitskufullur arbeiðari, fyrsta floks mekanikari, erligur kristin, men at hann hevur trupulleikar við sinnalagnum.

Daniel fær so í boði av missiónini, at hon vil senda hann til Føroyar at virka. Tað er ikki greitt, hvussu nógv teir gjalda, men teir gjalda í hvussu er ferðaseðilin og helst meira enn tað. Hann tykist ikki at hava mangla pening. Í minningarorðunum í Naade og Sandhed verður sagt, at hann var í nærum hvørji bygd í Føroyum og helt møti. Hann leigaði høli og rindaði úr egnum lumma. Eisini verður sagt í somu minningarorðum, at Daniel spýtti væl í kassan hjá blaðnum. Hann hevur eftir øllum at døma havt eitt dygt fíggjarligt grundarlag, og hetta kann vera fíggjað av Balolu missiónini. Sigast kann helst, at Congomissiónin hevur virkað í Føroyum.

Ætlanin er at kanna hetta meira. Men skjalasavnið, har tilfarið frá Congo Balolo missión finst, hevur ikki tilfarið tøkt beint nú, so hetta má bíða.

Hann byrjar so sítt virksemi í Føroyum í 1904, sum tað longu er greitt frá.

## Ummælið: Gjørdi sítt arbeiði til fulnar

**Seamas O Siochain sigur í síni meting um Daniel:** "Danielson gjørdi sítt arbeiði til fulnar. Nakrar ferðir í dagbókini er Casement kritiskur mótvegis Danielson viðvíkjandi ítøkiligum tilburðum, men hetta hevur á ongan hátt verið oyðileggjandi fyri hansara leiklut í høvuðsverkinum. Tað er heilt klárt fyri meg, tá ið eg útgreini hesa sigling, hvussu stórt álit var á trúboðarabólkarnar. Danielsen var ein partur av teimum."

Sigast kann, at Daniel hevur verið nógv hvønn vegin. Sum tað er greitt frá aðrastaðni kundi hann vera skemtingarsamur, men so kundi hann fara heilt yvir í hina grøvinina. Hetta váttar sum so bert, at hann hevur verið eitt menniskja við dygdum og lítum sum øll onnur.

**Komandi partur**

Í komandi parti verður greitt meira frá ítøkiligum hendingum, sum Daniel var ein partur av. Eisini verður greitt frá heilt óvæntaðu lagnuni hjá Casement og um Edmund Morel, sum eisini var ein sameindur í stríðnum fyri at bøta um umrøddu viðurskifti hjá teimum innføddu